# TILTØK

**Tvøroyrar kirkja**
Í samband við at Tvøroyrar kirkja verður 100 ár Kristi Himmalferðardag verður skipað fyri ymiskum tiltøkum.
Skrá fyri hátíðarhaldið:
Fríggjadagin 2. mai:
kl. 15.00 Myndaframsýning í skúlahøllini í Trongisvági.
kl. 20.00 Gospelkonsert í Tvøroyrar kirkju.
Leygardagin 3. mai:
kl. 14.00 Myndaframsýning í skúlahøllini í Trongisvági.
kl. 14.30 Matiné í kirkjuni við Tvøroyrar hornorkestur.
kl. 15.00 Fyrilestur í kirkjuni v. Jákup Reinert Hansen, presti, um Jákup Dahl og sálmayrking hansara.
kl. 19.00 Konsert í Tvøroyrar kirkju.
Sunnudagin 4. mai:
kl. 14.00 Barnagudstænasta í Tvøroyrar kirkju. Barnakórið í Glyvra kirkju syngur.
kl. 14.00 Myndaframsýning í Skúlahøllini í Trongisvági.

**Gudstænastur 6. sunnudag e. páskir**
***Vesturkirkjan:*** kl.11.00, Heri J. Joensen. Sunnudagsskúli er undir guðstænastuni
***Argir:*** kl.11.00 Hanus Simonsen altargongd
***Havnar kirkja:*** Kl. 11.00, Sonja Klein
***Nólsoyar kirkja:*** Kl. 12.00, Ann D. Hansen, konfirmatión
***Hoyvíkar kirkja:*** Kl. 11.00, Bjarni Bæk
***Kollafjørður:*** kl. 11, Theodor E. D. Olsen
***Vestmanna:*** kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
***Hvalvík:*** kl. 12, Mogens Tilsted Christensen
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11.00, Henning Bøgesvang
***Fuglafjørður:*** kl. 11.00, familjugudstænasta, Uni Næs
***Funningsfjørður:*** kl. 16.00, Uni Næs
***Gøta:*** kl. 11.00, Martin R. Jacobsen
***Christianskirkjan:*** kl. 11, lestur
***Kirkja:*** kl. 12, Elsa Funding
***Hattarvík:*** kl. 17.00, Elsa Funding
***Norðskála:*** kl. 11 messa Emil Olsen
***Bøur:*** kl. 11 altargongd David Johannesen
***Sandur:*** kl. 12, Jákup R. Hansen
***Sandvík:*** kl.11.00, Símun Jacobsen, altarg. Talvan gongur fyri kirkjuliga missiónsfelagið
***Hvalba:*** kl.12.30, Símun Jacobsen, altargongd. Talvan gongur fyri kirkjuliga missiónsfelagið
***Tvøroyrar kirkja:*** kl. 14 familju- og barnagudstænasta, Barnakórið í Glyvra kirkju luttekur, Jónsvein Bech
***Hov:*** kl.12, Patrick de Neergaard
***Røktarheimið á Tvøroyri:*** kl. 16, Patrick de Neergaard
***Suðuroyar sjúkrahús:*** kl. 17, Patrick de Neergaard

**Havnar Kirkja**
Aftankvirra verður í Havnar kirkju fríggjakvøldið 2. mai Kl. 21 – 23. Kl. 22. spælir og syngur Guðrið Hansdóttir. Eisini spælir Hans Carl Hansen guitar. Kl. 22.30 hevur Sólrun Poulsen andakt.

**Katólska kirkjan**
Fríggjadagin kl. 17.30: Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11: Hámessa v/ Wolf Schmidt, presti í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagin kl. 14: Sunnudagsskúli.
*www.katolsk.fo*

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 bíbliugransking og barnabíbliutími.
Kl.11: Gudstænasta Jens V. Danielsen.

**Hebron, Argir**
Leygardagin 3. mai
kl. 14-18: Temadagur
Sunnudagur 4. mai
Kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing
Kl. 11.30: Samvera við drekka
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli
Kl. 12.15: Møti. Sverri Steintún talar
Mikudagin 7. mai
Kl. 20: Húsbólkar, tí verður einki møti í Hebron
Sunnudagur 11. mai
Kl. 10:30: Morgunmøti oog samstundis barnaansing
Kl. 11.30: Samvera við drekka
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli
Kl. 12.15: Møti. Súni S. Jacobsen talar

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti, Trúgvi Dam talar.
Leygarmorgunin kl. 10 Kvinnur koma saman hjá Jastrud Clementsen, Marinargøta 7b.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti.
kl. 11.30 Samfelagsløta. kl. 12 tilbiðjunarmøti har Jógvan Z talar um Frá steinhjarta til kjøthjarta (13) – "Jesus er farin til Himmals - hvat nú?".
Kl 12 Sunnudagsskúli.
Undir báðum møtinum verður barnaansing.
Møtini eru at hoyra beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið kl. 20 á Brekku, møti har Lív í Skemmuni tosar um arbeiði í Afrika.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjakvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti v/ Petur Fonsdal Johannesen. Evni: Nóa.
Sunnudagin kl. 11.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagur kl. 19.00: Sangløta. Náttverði aftaná.
www.koma.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 v/ Egil Joensen

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustrœti*
Fríggjakvøldið kl 19.00 After8 kl 21.00 ungdómsmøti, sunnudagin kl 11.00 guðstænasta V/Litzie Lamhauge kl 12.00 sunnudagsskúli
Mánadagin kl 20.00 Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnudag kl. 14.00 Sunnudagsskúli og tað verur Omme og Abba dagur
Sunnudag kl 18.00: Møti v/ Bjartur Johannesen. Evni verður Bíblian og tónleikur.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Fríggjadagin kl. 17 Tímabøn í Evangeliihúsinum
Leygarkvøldið kl. 21.00 Flare
Sunnumorgun kl. 10.45 Morgunmøti - Anna Guttesen talar, Barnagudstænasta kl. 11.30
*www.filadelfia.fo*

**Samkoman við Marknagil**
Skúlaheimið, Marknagilsv.75
Møti:
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.00
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangelisk møti
Mánakvøldið kl 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti

**Ebenezer**
Sunnudag
kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangelist møti – Okkurt verður til børnini
Mánadag
kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla. Mánakvøldið kl. 20 felags bønarmøti í Filadelfia.
www.gospel.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Kvinnustevnan við vitjan av major Brit Knedal byrjar fríggjakvøld kl. 20 við kvinnumøti.
Leygardag kl. 10 ùtferð.
Sunnudaqg kl. 11 møti, kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 15 kvinnumøti, kl. 17 alment møti-
kvinnurnar luttaka við vitnisburði og sangi.
Náttverði aftaná.
*www.frelsunarherurin.fo*

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 5. mai kl. 15.00 í KFUK: Seinnapartssamkoma við Jóhan Henriksen úr Klaksvík. Evni: Filemonsbrævið.
Týsdagin 6. mai kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fy ri børn.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tórshavnar Manskór**
Sunnudagur 4. mai: konsert í Müllers Pakkhúsi kl. 19:30.
Solistar: Kristel Lisberg, Fróði Sandoy, Andrias Reinert, Mouritz Mohr.
Leygardagur 17. mai: kirkjukonsert í Svínoy.

**Landsstevnan**
Árliga Landsstevnan hjá sjómanskvinnuringunum í Føroyum verður í Leguhúsinum í Nesvík 16-18 mai. Tær sum vilja luttaka, skulu tekna seg hjá forkvinnuni fyri ringin á staðnum, ella hjá Ásu tlf.441384 ella hjá Torleif 449024, áðrenn 1 mai.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin 04/05 - Morgunmøti við breyðbróting klokkan 11
Sí: www.saron.fo
Verið vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagin verður sunnudagsskúli í Nesvík kl.15.00 og møti kl. 18.00 í samaband við felags Missiónsviku og verður tí hvørki sunnudagsskúli ella møti her.
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.00
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið Karmel á Eiði**
Møti verður sunnukvøldið kl. 19.00 v/ Justinus Poulsen.

**Miðvágs missiónshús**
Leyhardagin.kl: 20:00 Ungdómsmøti Bjarni Steintún talar og syngur.
Sunnudagin.kl 11:00 sunnudagsskúli. kl 18:00 møti við Jórun og Nurlan.
Meiniheitsfundur aftaná.
Innsavnan, barnaansing og nátturði

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 16 møti við sunnudagsskúla; Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Aglow Eysturoy**
Møti fyri gentur og kvinnur verður í Lívsins Orð í Runavík.
Leygarkvøldið 3 mai kl. 19.30. Talari: Elisabet Hvítklett. Lovsangur og drekkamunnur.
Verið hjartaliga vælkomnar :)

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin 04-05-08 kl 13.30 er sunnudagsskúli og kl 19.00 møti við Petur Steingrund.
Evni: Skapan og menning.
Innsamling til húsið.
Aftaná verður drekka og hugnalig samvera.

**Handverkarafelagshúsið á Skála**
Evangeliskt møti sunnukvøldið kl. 18 við Tórmund og fleiri.

**Keldan, Skálafirði**
Leygardagin kl. 10: Gentur og kvinnur samlast. Awake kl. 21
Sunnudagin kl. 17: Náttúrðamøti. Pauli Høj talar.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl.18.00: Møti

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur 2. mai kl. 21:00:Ungdómsmøti. Bjartur Johannesen talar.
Sunnudagin 4. mai kl. 17:00: Sunnudagsskúli og møti.
Streingjakórið á Glyvrum luttekur. Innsamling: til húsið.
Drekkað aftaná.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Rituvíkar Missiónshús**
Leygardagin 3. mai:
Kl. 20:00: Ungdómsmøti
Sunnudagina 4. mai:
Kl.16:00 Familjumøti

**Kambsdalur, Handilskúlin**
Sunnumorgun kl.11: Breyðbróting. Týskvøld kl. 20: Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnukvøldið tann 4. mai, verður møti í Thabor kl. 18, har tey ungu eru við til at skipa fyri. Á skránni verður "Sang- og vitniløta". Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli, kl 17 verður familjumøti við Ann Mari Kjølbro og
kl 21 verður ungdómsmøti við Snorra Brend.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kallsoy**
Fríggjadagin kl. 20.00 tala Niels Jacob Nielsen og Hanus Lassen á Syðradali, og leygardagin kl. 20.00 Niels Jacob Nielsen og Hanus Lassen á Trøllanesi.

**KFUM & K Klaksvík**
Sunnudagin 4. mai
kl. 14.00 Sunnudagsskúli
kl. 17.30 Bønarløta
kl. 18.00 Møti við Akselsen og Nordendahl
Streingjakórið syngur.
Innsavnan er til húsið.
kl. 21.00 Ungdómsmøti

**Getsemane**
*Stangaskákið* 1
Fríggjakvøldið kl.20.30 er ungdómsmøti, ung frá Soli Deo Gloria luttaka
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn
Sunnudagin kl.18.00 er møti v/ Høgna á Reynatrøð.
Barnamøti er samstundis
Hvønn gerandismorgun kl.6:15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl 18.00: møti v/ Thomas Juul Askham og Jóannes Dánielsen

**Betania, Skopun**
Fríggjakvøldið sangvenjing kl. 20

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/RagnheiðurViderø. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Jógvan Højgaard Trúboðara.

**Sion, Vágur**
Møtir verða 4. mai kl. 11:00 og kl.18:00. David Bech talar.
Mánakvøldið 5. mai verður bønarmøti kl. 20:00

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Sunnudagin kl. 18.oo møti. Fríðbjørg og Niels Hammer tala og syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Týsdagin kl. 20.00 Bíbliutími og bønarløta.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjamorgun kl 9.30: Orðið á borðið
Sunnudagin kl 11.00: Morgunmøti/Sunnudagskúli. Kl.18 evang møti.
Eisini minna vit á árasøluna sum verður leygardagin 31/7

**Missiónshúsið í Porkeri**
Møti verður í Missiónshúsinum í Porkeri sunnukvøldið 4. mai kl 18.
Michela Johansen og Helena Petersen av Tvøroyri tala.
Streingjakórið í Porkeri syngur.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Betaniakirkjan, Ålborg**
Leygarkvøldið 3. mai kl. 19.00 verður evangeliskur fundur í Betaniakirkjuni, Dag Hammerskjolds 2, Ålborg.
M.C. Restorff og aðrir syngja. Levi Joensen og aðrir tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Samkoman Malta*

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Fyrilestur**
Ingelise Guldborg Sørensen, íð starvast sum fysioterapeutur á Eysturoyar Røktar & ellisheimi í Runavík, fer at halda fyrilestur um Fólkaheilsu og lívsgleði í tí globala samfelagnum.
Tað er øðrvísi at liva í dag, enn tað var fyri tjúgu árum síðan. Arbeiðsmarknaðurin er nógv broyttur, arbeiðsuppgávurnar eru øðrvísi, og gerandisdagurin er annarleiðis. Tað modernaða menniskjað hevur allar hentleikar við hondina: teldur, fartelefonir, vaskimaskinur, uppvaskimaskinur osfr., men hóast hetta, so sigur læknafrøðin, at ongantíð hava fólk verið so strongd sum nú. Serfrøðingar vilja vera við, at tunglyndi er vorðin ein fólkasjúka, aðrir siga seg hava staðfest, at tað høga blóðtrýstið skyldast fyrst og fremst og tunga arbeiðsbyrðu. Men tá íð tann góða heilsan er ein fyritreyt fyri einum góðum lívi, hvussu skulu vit so bera okkum at fyri at varðveita heilsuna góða ?
Hetta evni fer Ingelisa Guldborg Sørensen at varpa ljós á.
Tað er Tofta Kvinnufelag, íð skipar fyri. Fyrilesturin verður á Vesturskyni 6. mai 2008 kl. 19,30.
Í samband við fyrilesturin fara ung at syngja og spæla tónleik, eisini verður ein kaffimunnur at fáa og burturluting.
Fyrilesturin er ókeypis. Møtið fjølment !